

Allan Skaalum, fyrrverandi stjóri á Landssjúkrahúsinum

Mynd: Jens Kristian Vang

## FAKTA

Allan Skaalum, 47 ár.
Giftur við Guðny.
Tey eiga trý børn, 15, 16 og 19 ár.

**1991:** Cand.Merc. prógv frá CBS í marknaðarføring og leiðslu
**1991-1995:** Fulltrúi, Føroya Banki
**1995-1997:** Búskaparfrøðingur, Oljufyrisitingin
**1997:** Fíggjarleiðari, ALS
**1997-1999:** Stjóri, ALS
**2000-2001:** Stjóri, ReproZ
**2001-2006:** Vinnukundaráðgevi, Føroya Banki
**2006-2010:** Sjúkrahússtjóri, Landssjúkrahúsið

fara undir at seta síni fingramerki á bygnaðin á Landssjúkrahúsinum. Saman við hinum í leiðsluni setti hann sær fyri at menna leiðslumentanina, starvsfólkatrivnaðin, búskaparligu stýringina og viðurskiftini hjá sjúklingunum. Ein endamálsorðing varð gjørd fyri Landssjúkrahúsið, og húsið fekk eina neyva visión. Visiónin var í trimum og snúði seg um at seta sjúklingarnar, starvsfólkini og samfelagið í miðdepilin. Hetta, at øll fingu felags stevnumið at arbeiða eftir, heldur Allan Skaalum í dag var eitt tað týdningarmesta, ið kom burtur úr stjóratíðini.

- Tá vit fingu orðað stevnumiðini og kundu skipa arbeiðið eftir tí, lætti tað beinanvegin um fatanina av, hvussu vit skuldu raðfesta. Tað var sera gleðiligt, at vit hildu játtanina í 2009, men hetta hevði ikki borið til, um ikki øll høvdu eina felags fatan av, hvør uppgávan var. Eg haldi, at góða úrslitið sást aftur á starvsfólkunum, tí tey rættu ryggin og vóru errin. Samanborið við øll onnur sjúkrahús í ríkinum var tað sjáldsamt at halda játtanina, so hetta var eg eisini sjálvur fegin um. Gleðiligt er í dag at síggja, at seinasta nøgdsemiskanningin millum sjúklingarnar vísir stóra framgongd samanborið við kanningina, vit gjørdu fyri góðum tveimum árum síðan. Alt hetta sigur mær, at vit gjørdu nógv rætt, sigur hann.

Eftir boðini um uppsøgnina fríggjakvøldið 20. august fóru hann og konan uttanlands í feriu, eins og tey høvdu ætlað. Í Turkalandi fylgdi hann við orðaskiftinum um, hví hann var biðin um at fara heim, og skjótt sá hann, at fleiri hildu hetta vera margháttligt og órímiligt. Hann kundi ikki annað enn vera samdur. Tá tey bæði so komu heimaftur nakrar vikur seinni, frætti hann um undirskriftirnar frá fleiri enn 400 starvsfólkum á Landssjúkrahúsinum, ið vildu hava hann settan aftur í starvið. Hóast hann væl visti, at hetta neyvan var realistiskt, fløvaði stuðulin frá starvsfólkunum almikið.

- Tá ein leiðsla sum tann á Landssjúkrahúsinum tekur avgerðir, er einstaka stavsfólkið langt frá altíð samt við henni. Í 2009, tá stór inntriv vórðu gjørd fyri at halda játtanina, bóru bæði leiðsla og starvsfólk tungar byrðar, m.a. tí semjur vórðu gjørdar, ið gingu teirra fakliga stoltleika nær. At allar hesar undirskriftirnar kundu verða savnaðar saman eftir so stuttari tíð, hóast Landssjúkrahúsið á mongum økjum ikki bjóðar starvsfólkunum nøktandi arbeiðstreytir, gjørdi meg ovfarnan. Kanska komst stuðulin av, at eg allatíðina royndi at spæla við opnum kortum, og at starvsfólkini kendu grundgevingarnar fyri teimum skerjingum, vit máttu gera, sigur Allan Skaalum.

### Lítur framá

Tíð hansara á Landssjúkahúsinum er nú farin, og síðan hann fór úr stjórastarvinum, hevur hann havt stundir at putlast við sovorðið, hann ikki hevði fingið frá hondini heima í Gundadali. Eisini hevur hann havt stundir at vera við í onkrari spennandi verkætlan. Sjálvur heldur hann tó, at ov long tíð helst ikki má ganga, áðrenn hann aftur fer í fast starv, og undir samrøðuni nevnir hann, at møguleiki er fyri, at hann skjótt verður aftur at síggja í onkrum áhugaverdum starvi.

Eg haldi ikki, at nógv størv í Føroyum eru so spennandi sum stjórastarvið á Landssjúkrahúsinum, men eg hevði hugsað meg væl um, áðrenn eg fór inn í eina politiskt stýrda fyritøku aftur. Eg havi fingið eina barlast við mær á Landssjúkrahúsinum, sum er gull verd, sama um eg fari at arbeiða hjá tí almenna ella tí privata. Lendingin á Landssjúkrahúsinun var hørð, men eg havi valt at líta framá, og eg vóni, at starvsfólkini á Landssjúkrahúsinum fáa ein góðan stjóra aftan á meg. Eg havi verið og heilsað uppá, síðan eg gavst, og eg haldi, at tingini eru avklárað. Eg misunni honum ella henni, sum tekur við eftir meg, og kann bara siga, at Landssjúkrahúsið er eitt av bestu arbeiðsplássunum í Føroyum, sigur fyrrverandi stjórin.

Nú framtíðin liggur opin fyri honum, og tíðin á Landssjúkrahúsinum er eitt minni um eina farna tíð á lívsleið hansara, kann hann eins og øll onnur gleða seg til jólafriðin, ið skjótt fer at leggjast um landið. Jólini fer hann at halda í heima í Gundadali.

- Vit fara at eta gás úr Syðradali og dunnu jólaaftan. Fyrsta jóladag plaga vit at vera saman við brøðrunum hjá konu míni og teirra familjum hjá vermóðir til fleskasteik. Seinastu jól var so góður kavi, at vit fóru niðan á Kleynisvarða at skreiða. Vónandi verður kavi aftur í ár, so vit kunnu fáa ein frískligan túr í kavanum oman á góða jólamatin, sigur Allan Skaalum.